# Theodor: 100 ára ga

**Tann 28. oktober fylti Theodor Thomassen í Sørvági 100 ár. Hóast tað er í seinna lagi vilja vit ynskja honum hjartaliga tillukku við hesum stóra degnum. Vit hava verið á gátt hjá Theodor, har hann hevur greitt nakað frá sínum langa lívi**



*»Gamli maðurin og havið«. 99 ára gamli Theodor fílar so hugaliga*

## Aldur



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Tað eru nokk so nógv fólk, sum gerast 100 ár nú á døgum, men tey eru fá, sum hava verið so leingi virkin sum Theodor. Ikki minst er hetta einastandandi, tá ið hugsað verður um, hvussu langa tíð, hann hevur drivið sjógvin. Hann fór til skips 14 ára gamal í 1923, og hann hevur verið á floti so seint sum í fjør, 99 ára gamal! Hetta er ikki minni enn 85 ár.

Hóast Theodor er nakað deyvur og nakað blindur, er hann væl fyri. Tað besta av øllum er, at hann hevur eitt sera positivt lyndi. Hetta kann saktans vera ein góð frágreiðing um eitt gott og langt lív.

Theodor er føddur í 1908, og hetta merkir, at hann hevur upplivað stórt sæð allar broytingar, sum hava verið í samfelagnum yvirhøvur. Tí eru fólk sum hann so áhugaverd, og tí er tað so umráðandi at fáa teirra søgu niðurskrivaða.

### Útróðrartúrurin hjá abbanum

Annar abbi Theodor var Dunga Jóannes. Theodor greiðir frá eini áhugaverdari søgu um, hvussu útróðrarlívið kundi vera tá.

Teir vóru farnir til útróðrar, tá ið hann gjørdist høgur í ættini. Teir flestu bátarnir fóru til hús, men beiggi Jóannes, sum var formaður á bátinum, gav boð um at seta línuna niður aftur. Tá ið drigið var, fóru teir so at rógva til lands. Men tá ið teir koma inn móti Sundunum er ókyrt millum land og Tindhólm, og teir vunnu ikki longur. Hvat var so at gera? Jú, at fáa størri manning. Abbin verður settur á land. Hann skuldi ganga til Sørvágs at fáa meira fólk. Hetta eydnast eisini, men tá ið teir koma aftur hagar báturin lá, vóru ikki líkindi eisini orsakað av sjóvarfallinum at sleppa umborð í hann. Teir seta so segl á bátin og sigla til Miðvágs. Abbin fór so aftur til gongu, fyrst til Sørvágs, og so til Miðvágs at taka ímóti bátinum. Tá ið báturin var framkomin og alt var fingið til sættis, var aftur at ganga til Sørvágs. Alt hetta var eftir ein strævnan útróðrartúr.

### Gerandisdagurin fyri 100 árum síðani

Foreldrini hjá Theodor vóru Andreas og Elspa f. Hansen. Um pápan kann sigast, at hann fór ikki í skúla fyrr enn hann var 12 ár. Áðrenn tað róði hann nevniliga út.



*Theodor og Nencea*

Tilsamans vóru tey átta systkin, fýra beiggjar og fýra systrar. Pápin var fiskimaður sum flestu menn tá í tíðini. Tí mátti mamman eins og aðrar konur vera bæði maður og kona helvtina av árinum.

Tey eru kanska ikki nógv, sum í dag gera sær far um, hvussu stríggið hetta hevur verið. Tað kann bert takast sum dømi, tá ið maður og synir skuldu fara til skips. Her skuldi alt riggast til frá grundini av. Klæðini skuldu bindast, so sum hosur, vøttir, undirklæði og troyggjur. Seymast skuldi um madrassurnar. Sjálvt oljuklæðini skuldu seymast og síðan ferniserast fleiri ferðir.

Tá so maðurin var farin, sat konan eftir við ábyrgdini av húsarhaldinum umframt ta óvissu, sum altíð var um, hvørt maðurin fór at koma aftur í øllum góðum.

Húsini hjá teimum var ognarleyst. Her var eingin jørð, og tí kundu tey ikki hava kúgv. Tískil fekst eisini lítil og eingin mjólk. Tey kundu biðja sær mjólk, men hetta var bert til tað mest neyðuga.

Hetta merkti eisini, at tey ikki áttu torvheiðar. Torv máttu tey so hava. Tey máttu biðja um at sleppa at skera torv hjá øðrum móti gjaldi.

Theodor greiðir frá, at ein mannskurður av torvi var roknaður at vera 30 klyvjar, tað sama sum 60 leypar, t.v.s. tað sum ross kundi bera 30 ferðir við tveimum leypum hvørja ferð. Hetta sigur nakað um, at hetta hevur kravt nógv arbeiði eisini.

Tá tey ikki áttu jørð, áttu tey heldur ikki seyð. Tey leigaðu kortini fýra gyllin, og hetta gav fýra lomb árliga. Abbin plagdi eisini at laga garðar fyri aðrar. Samsýningin fyri hetta var eitt jarðarstykki, har tað kundi veltast.

### Maturin

Men mat fingu tey kortini. Á Sørvágsfirði var nógv bæði av fugli og fiski. Tað lá væl fyri at fara á flot, nógvur seiður var inni við land, og honum kundi nót kastast eftir. Fuglur kundi skjótast á fjørðinum, og havhestur kundi fáast í bjørgunum. Tað kundi tó vera langt millum grindirnar.

Nógv av hesum mati varð saltað, so saltmatur var sera vanligur døgurði. Men inn ímillum fekst eisini fekst.

Tað var eisini nógv arbeiði í Sørvági. Her vóru fleiri reiðarar, sum áttu nógv skip. Nevnast kunnu Niclassen menninir, Løðu

Sosialurin